ÁRSFRÁGREIÐING 2022-2023

Innihald

1 Virksemið hjá MEGD 2022-2023 2
1.1 Starvsnevndin 2
1.2 Skrivstovan 2
1.2.1 Fylgjarakort 3
1.2.2 Parkeringskort 3
1.3 Fíggjarviðurskiftir 3
1.4 MEGD blað um rættartrygd 4
1.5 Altjóða dagur teirra, ið bera brek 4
2 Brekrættindasáttmálin 4
2.1 Hagtøl og lýsing av brekøkinum 5
3 Formansfundir 5
4 Lógararbeiði 6
4.1 Ummælisskriv 6
4.2 Netkanning og felags fundur við landsstýrið 6
5 Rættindi og luttøka 7
5.1 Samskiftisdepil 7
5.2 Bústaðarviðurskifti 7
5.3 Atkoma 7
5.3.1 matstovur 7
5.4 Øll hava rætt til ítróttarligan felagsskap 7
6 Ymiskt 8
Altjóða samstarv 8
Umboðan í Ráðum og nevndum í Føroyum 9

1 Virksemið hjá MEGD 2022-2023

1.1 Starvsnevndin

Í starvsnevndini hjá MEGD sita teir av aðalfundinum valdu limir: Forkvinnan og 4 limir, umframt 2 tiltakslimir. Hesi skulu vera úr ymiskum feløgum.

Starvsnevndarlimir og tiltakslimir verða valdir fyri tvey ár ísenn, og kunnu verða afturvaldir eina ferð.

Forkvinnan/maðurin verður vald/ur fyri trý ár í senn, og kann veljast aftur.Starvsnevndin skipar seg á fyrsta fundi eftir ársaðalfundin.

Øll viðkomandi mál verða viðgjørd í starvsnevndini, og hevur starvsnevndin ein fund um mánaðin, tó undantikið í juli. Aðalfundurin varð hildin 7. mars 2022 á Hotel Føroyum.

Tey, ið hava mannað starvsnevndina síðan aðalfundin í 2022, eru:

Tóra við Keldu, forkvinna

Petur Elias Petersen, næstformaður

Katrin Jacobæus, nevndarlimur

Fía Petersen, nevndarlimur

Bjørg Dam, nevndarlimur

Sonja Tausen, tiltakslimur

John William Joensen, tiltakslimur

1.2 Skrivstovan

Tóra við Keldu er forkvinna í MEGD er at hitta á skrivstovuni týsdag, mikudag og hósdag.

Á skrivstovuni starvast Steindóra á Stongunum, skrivstovufólk, Gullbjørg Rasmussen, reingerðarfólk, og hin 1. juni 2022 byrjaði Bárður Atlason Ísheim í starvi sum aðalskrivari.

Virksemið á skrivstovuni snýr seg um umsiting av parkerings- og fylgjarakortum, móttøku av viðskiftafólki, telefonsamskifti, ráðgeving til limafeløg, feløg, almennar myndugleikar og privatpersónar.

MEGD fær ymiskar fyrispurningar frá privatfólki, stovnum og myndugleikum. MEGD tekur sær so vítt gjørligt ikki av einstaklingamálum uttan so, at tað hevur serligan almennan áhuga. Felags fatanin er tann, at limafeløgini eru betri før fyri at loysa einstaklingamál.

Heimasíðan
MEGD hevur eina virkna heimasíðu, sum er umráðandi sum samskifti úteftir. Umframt hevur MEGD eisini eina virkna síðu á Facebook og Instagram.

Húsið
Fleiri av limafeløgunum nýta hølini í MEGD, og hevur nógv virksemið verið í húsinum, nú fleiri limafeløg skipa fyri sjálvhjálparbólkum. Somuleiðis er møguligt hjá øðrum at leiga hølini. Feløgini, sum hava skrivstovu í MEGD húsunum, eru: Sinnisbati, CP Føroyar, Gikta- , Diabetes-, Hjarta- og Psoriasisfelagið. Alzheimerfelagið og ADHD felagið hava hølir saman, og somuleiðis hava Heilafelagið og Parkinsonfelagið og Epilepsifelagið og Autismufelagið hølir saman. Leiguavtala varð gjørd í 2022 við Hoyr, sum nú hevur høli saman við Hjartafelagnum.

Ábøtur á MEGD húsið hava snúð seg um umvæling av durakarmi í úthurðini í fundarhølinum, og sum royndarverkætlan samstarvar MEGD við Sjóndepilin um at salta, tá kavi og frost er.

1.2.1 Fylgjarakort
Síðan skipanin varð sett í verk, hava 585 fólk, ið bera brek, fingið fylgjarakort. Í 2019 var avtalan um fylgjaraskipan við Smyril Line endurnýggjað, og í 2022 varð avtalan við Atlantic Airways endurnýggjað. Avtalan við Føroya Kommunufelag varð endurnýggjað í 2018.

1.2.2 Parkeringskort
Síðan skipanin við parkeringskort varð sett í gildi hava 638 fólk fingið parkeringskort. Fólk vendu sær til MEGD um møguleikan at fáa útflýggjað stovnskort, har stovnskortið er knýtt at akfari, sum hoyrir til stovnin. Við kunngerðini var tað ikki møguligt, tí eitt parkeringskort er persónligt. MEGD vendi sær til myndugleikan á økinum og 16. Februar 2021 kom nýggj kunngerð við ásetingum um stovnskort í gildi. Nú hava sambýlir fyri rørslutarnaði og bústovnar til eldri møguleika at søkja um stovnskort, har tað eru ein ella fleiri borgarar knýttir at stovninum, sum eru sera illa gongdir, hava varandi niðursett evni at virka ella onnur líknandi heilsulig viðurskifti, sum í stóran mun skerja evnini ella gera tað trupult at ferðast, og sum lúka krøvini um útgávu av parkeringskorti. 11 stovnar hava fingið stovnskort higartil.

1.3 Fíggjarviðurskiftir
Stuðulin yvir fíggjarlógina fyri 2022 var 1,65 mill. Við støði í lóg um ítróttavedding fær MEGD tillutað 5% av veddingarpengunum. Upphæddin fyri 2022 var 782.000 kr. Veddingarpeningurin kemur limafeløgunum og MEGD til góðar.

Býtislykilin
Sambært viðtøkunum hjá MEGD, skal aðalfundurin taka støðu til býtið av fíggjarliga stuðlinum til limafeløgini. Aðalfundurin 2022 samtykti, at játtanin frá Fíggjarlógini skal fara til MEGD og stuðulin frá Ítróttarvedding skal fara til limafeløgini. Hetta samsvarar betri við innihaldið í viðkomandi lógunum (Fíggjarlógini og lógini fyri Sp/f ítróttarvedding).

Uppskotið frá Starvsnevndini var at koyra 300.000 í Limagrunnin, og býta írestandi kr. 482.000 millum limafeløgini sambært býtislyklinum. Uppskot til at brúka sama býtislykil í 2023 , sum undanfarna ár, verður lagt fram á aðalfundinum.

Limagrunnurin

Virksemið í limafeløgunum tók seg rættiliga uppaftur eftir steðgin orsakað koronu, og vóru nógvar umsóknir viðgjørdar og játtaðar í starvsnevndini í 2022. Starvsnevndin samtykti broytingar í reglunum fyri Limagrunnin í 2022. Dagførdu reglurnar liggja tøkar á heimasíðuni. Framvegis er týdningarmikið at hava í huga, at feløgini kunnu søkja um stuðul til tiltøk, og at peningur er tøkur í grunninum.

Verkætlanargrunnurin

Fáar umsóknir vóru úr verkætlanargrunninum hjá MEGD í 2022. Endamál grunsins er at stuðla verkætlanum, ið eru til gagns fyri eitt ella fleiri limafeløg hjá MEGD ella fyri meginfelagið. Verkætlanir, ið fáa stuðul úr hesum grunni skulu skipast í samsvari við endamálsorðinga hjá viðkomandi limafelagi, limafeløgum ella meginfelagi. Limafeløg eru sostatt vælkomin at søkja grunnin um stuðul, tá verkætlanir verða skipaðar.

1.4 MEGD blað um rættartrygd

MEGD blaðið kom út áðrenn altjóða dagin hjá teimum, ið bera brek, sum árliga er 3. desember. Blaðið viðgjørdi rættindi og rættartrygd, lýst út frá ymiskum sjónarhornum. Blaðið fæst við at venda sær til skrivstovuna, ella við at vitja heimasíðu okkara undir SAVN.

1.5 Altjóða dagur teirra, ið bera brek

Í sambandi við at Løgtingsval varð útskrivað til at verða hildið hósdagin 8. desembur, varð altjóða dagurin skipaður sum almennur borgarafundur á Skúlatrød í Klaksvík. Valevni úr øllum flokkum umrøddu spurningin um Føroyar er eitt vælferðarsamfelag. Kjakið tók støði í stóru avbjóðingunum við vælferðarskipanum, og fitt av fólki varð møtt at lurta. Fleiri settu valevnunum spurningar, og aftur fleiri fylgdu við á netinum og í sjónvarpinum á Rás1.

2 Brekrættindasáttmálin

MEGD arbeiðir miðvíst við at eygleiða, umrøða og minna viðkomandi partar á niðurstøðurnar hjá nevndini undir Brekrættindasáttmálanum hjá ST. Endamálið er at ávirka viðkomandi partar, serliga almenna myndugleikan, at arbeiða miðvíst við at gera neyðugar broytingar og tillagingar, fyri soleiðis at tryggja menniskjarættindi hjá fólki, ið bera brek í Føroyum.

Samskipandi eind og brekpolitisk virkisætlan

Striltið hevur gingið at fáa samskipandi eindina sambært ST- sáttmálanum at virka. MEGD fegnaðist á vári 2019, tá *Samskipandi eindin* varð sett. Longu í 2020 var nýggj nevnd vald. Í 2021 hevur aftur verið umskipan av nevndini í Almannamálaráðnum og útskifti av umboðum í nevndini. Nevndin skuldi

sambært samgonguskjalinum gera eina *yvirskipaða brekpolitiska virkisætlan fyri Føroyar (Samgonguskjal 2019-2023, s. 13),* men enn er eingin ætlan gjørd.

Mannarættindaeind / Talsfólk á brekøkinum / Brekumboð

Við støði í altjóða brekrættindasáttmálanum grein 33, og niðurstøðunum hjá nevndini undir nevnda sáttmála, hevur MEGD í fleiri ár víst á, at Føroyar hevur einki óheft eftirlit á brekøkinum, ið hevur til endamáls at virka fyri at menniskjarættindi verða vard. Málið varð í 2021 viðgjørt í Uttanríkisráðnum og politisk avgerð var tá tikin vísandi til undanfarnu málsbýtisfráboðan § 44, stk. 2, at tað var landsstýriskvinnan í almannamálum, sum skal taka sær av málinum at seta í verk skipan við talsfólki til borgarar við tørvi vegna brek v.m. Grundgevingin fyri, at talsfólkið verður staðsett í Almannamálaráðnum er, at Almannamálaráðið hevur nógv tey flestu málini viðvíkjandi fólki, ið bera brek, og tí hevur tað hildið verið natúrligt, at Almannamálaráðið tekur sær av málum, viðvíkjandi teimum, ið bera brek, sum ikki hoyra til einstaka geiran ella sum eru tvørgangandi. Nýggja samgongan hevur valt at fylgja sama leisti. MEGD ynskir, at eftirlitið fer at virka tvørtur um geirar, og at arbeitt verður við at hetta liggur saman við øðrum lógareftirliti, eitt nú undir Løgmansskrivstovuni ella undir Uttanríkistænastuni. 23. mai 2022 var MEGD á fundi við Almannamálaráðið um hetta evnið. Talan var um ein góðan fund, og MEGD fekk kunning um, at Landsstýrið arbeiðir við málinum.

2.1 Hagtøl og lýsing av brekøkinum

Sambært grein 31 í ST- sáttmálanum skulu limalondini átaka sær at savna hóskandi upplýsingar, eisini hagtals- og granskingartilfar, sum ger tey før fyri at orða og seta í gildi reglur, ið seta sáttmálan í verk. MEGD hevur víst á, at í Føroyum mangla vit hagtøl fyri alt brekøkið. Hagtøl eru grundarlag undir gransking og gevur eina dygga yvirlitsmynd av økinum, sum kann nýtast í arbeiðinum fyri betri korum á brekøkinum. Týdningarmikið er tí frá almennari síðu at gera neyðugar fyriskipanir, sum samla inn hagtøl eftir altjóða hagtalsstandardum, at hagtølini verða greinað og løgd fram fyri almenninginum og feløgum, soleiðis at tey kunnu gagnnýtast, tá tað er neyðugt. Hugvekjandi varð at hoyra um álvarsomu hagtalskanningina í Danmark, ið prógvaði at óneyðuga nógv bein vórðu blivin amputerað á ávísum sjúkrahúsi í Danmark. Á slíkan hátt kunnu hagtalskanningar tryggja mannrættindi ella prógva mannarættindabrot. Granskingarverkætlanin hjá MEGD um trivnað hjá fyritíðarpensjónistum verður eftir ætlan liðug í 2023.

3 Formansfundir

16. mars var formansfundur, har evnið var limagrunnurin hjá MEGD, og við dømum frá trimum limafeløgum varð umrøtt hvussu hann kann nýtast.

Limafundur var aftur 6. apríl, har Almannaverkið legði fram um evnið *Er vælferðin í vanda?* Ein greið framløga, sum vísti, at avgjørdar avbjóðingar bíða okkum, og at vit eiga at gera nakað munagott við tær sum skjótast.

Limafundur var aftur hósdagin 27. oktober á Biskupstorgi í Klaksvík. Evnið var um *Rættartrygd hjá borgarum, ið bera brek*. Fleiri limafeløg og MEGD fáa ofta fráboðanir um, hvussu borgarar, ið bera brek og avvarandi, stríðast við skipanum og viðurskiftum, ið ikki taka hóskandi atlit til brek ella varandi sjúkur.

Avleiðingarnar eru mangan álvarsamar, og vit hava varhugan av, at rættartrygdin hjá okkara limum til tíðir er avmarkað. Løgtingsins umboðsmaður og Rættarhjálp Føroya løgdu fram.

4 Lógararbeiði

4.1 Ummælisskriv

MEGD fegnast um at fáa lógaruppskot, kunngerðir o.a. til hoyringar. Alt hoyringartilfar verður sent víðari til limafeløgini, sum fáa møguleika at viðmerkja. MEGD sendir ummælisskriv til øll uppskot, sum verða send felagnum. Í 2022 sendi MEGD hoyringarskriv í sambandi við fylgjandi lógir, ríkislógartilmæli, kunngerðir, frágreiðing, vegleiðing o.a.:

- Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið
- Uppskot til Løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørrelse om straffeloven (Revsilógin)
- Uppskot til Løgtingslóg um integratión (Integratiónslógin)
- Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kringvarp
- Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur (Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku í sambandi við at barn doyr, stuðul til sjúkuútreiðslur og javning)
- Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um familjuískoyti (Oljuískoyti til húski)
- Frágreiðingina *Í góðum hondum*, sum lýsir avbjóðingar við starvsfólkatørvi á vælferðarøkinum.
- Kunngerð um at seta í gildi § 4 í løgtingslóg um talgildan samleika.
- Uppskot til Leiðbeining um viðgerð av klagum hjá javnstøðunevndini.
- Uppskot til kunngerð um medisinska útgerð og medisinska útgerð í in-vitro diagnostikki.
- Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet (Regulering og forrentning af erstatnings- og godtgørelsesbeløb).

Øll hoyringarskrivini liggja á heimasíðuni, www.megd.fo.

4.2 Netkanning og felags fundur við landsstýrið

Eftir áheitan frá landsstýrismanninum í heilsumálum, varð ein arbeiðsbólkur mannaður av umboðum frá Almannamálaráðnum, Heilsumálaráðnum og Kommunufelagnum við tí endamáli at hyggja eftir um endurvenjing í Føroyum virkar sum ein samanhangandi tvørfaklig skipan, har rættindi og skyldur hjá borgarunum eru tryggjað, so at hesir aftur kunnu fara at virka í gerandisdegnum.

Í hesum høpi skipaði MEGD fyri spurnakanning á netinum millum limir í feløgunum um at hjálpa við lýsa endurvenjiingina í Føroyum út frá sjónarhorninum hjá borgarum, ið hava royndir við endurvenjing. Undirtøkan í kanningini varð góð, og Landsstýrið bjóðaði til fundar eftir at úrslitini vórðu tøk. Talan varð um ein felags fund, har umboð úr seks feløgunum, umframt meginfelagnum, luttóku. Fundurin var góður, og semja var um, at tað tóktist gagnnligt at sleppa at greiða landsstýrinum frá avbjóðingum, ið avvarðandi og fólk, við breki, stríðast við, og síðani práta um møguligar loysnir.

5 Rættindi og luttøka

5.1 Samskiftisdepil

MEGD hevur í fleiri umførum víst á, at tað vanta tilboð til fólk, sum hava tørv á stuðul at samskifta. MEGD mælir til, at ein Samskiftisdepil verður settur á stovn í Føroyum, har einhvør kann venda sær við samskiftisspurningum, óansæð um talan er um sjón, hoyrn, talu, rødd, kognitión, at lesa og stava ella tøknilig hjálpartól.

Ein samskiftisdepil hevur vanliga tilboð um útgreinan, ráðgeving, undirvísing og at veita hjálpartól innan samskifti. MEGD vitjaði í juni 2022 Kommunikationscentret, sum liggur í donsku høvuðsstaðarregiónini. Á Kommunikationscentret hava tey servitanina og samstarva við kommunur um at útvega borgarum neyðugu hjálpina. MEGD metir, at ein sterkur samskiftisdepil við ymiskum serfrøðingum í samskifti kundu veitt munadyggar fakligar tænastur til fólk, sum hava einhvørja samskiftisavbjóðing.

Slíka tænastu, har tað er einfalt at venda sær til, eru tað fleiri foreldur og vaksin, sum eftirlýsa. MEGD var á fundi 12. januar 2022 við landsstýrismannin Sólvit E. Nolsøe saman við umsitiningini í Almannamálaráðnum, har málið var umrøtt. Harumframt bað MEGD um fund við Jenis av Rana, landsstýrismann í mentamálum, sum varð hildin í apríl. Hóast fundurin tóktist sera positivur, hendi ikki meira hesum viðvíkjandi í 2022.

5.2 Bústaðarviðurskifti

Sum støðan er nú, mugu fólk, ið bera brek, bíða sera leingi eftir at fáa egið heim. Hetta ávirkar trivnað og lívsgóðsku, bæði hjá teimum og avvarðandi teirra. Tískil má ferð fáast á at byggja heim og bústaðir innan brekøkið. Nýggja sambýlið á Mýruni í Hoyvík er skjótt liðugt, og heimið til børn við autismu í Kvíggjartúni á Argjum er eisini komið langt. Hetta fegnast MEGD um, umframt at vit sóu í sambandi við løgtingsvalið, at breið semja er í samfelagnum um, at víðari neyðug stig mugu takast sum skjótast.

MEGD ger áhaldandi vart við, at atlit eiga at verða tikin til, at nýggir bústaðir vera hugnaligir og heimligir, og at trivnaður og lívsgóðska hjá fólki, ið bera brek, áhaldandi verður í miðdeplinum, tá bygt verður. Vit mugu í felag virka ímóti stovnsgerð (*institutionalisering*), og sama høpi tryggja, at tað ikki verður bygt ov stórt. Gransking úr Noregi og Svørríki vísur, at fólk trívast best í smáum bústøðum/felagsskapum/eindum, og MEGD hevur enn onga gransking sæð, ið gevur ábendingar um, hvussu starvsfólk ella húsfólk trívast í størri eindum.

5.3 Atkoma

5.3.1 matstovur

Í samband við átakið á sumri 2019 um atkomuligar matstovur í Føroyum, fekk MEGD í 2021 gjørt ein lykil frá Mikkalina glas, sum var útborin til tær 18 atkomuligu matstovurnar, sum fingu viðurkenningina fyri góða atkomu. Hin 16. mars 2022 fekk matstovan Fiskastykkið í Sandavági lykilin.

5.4 Øll hava rætt til ítróttarligan felagsskap

Tað er ein sannroynd, at luttøka og samanhald í og um ítrótt, hevur sera stóran týdning fyri lívsgóðsku, samanhald og trivnað hjá okkum øllum. Tó vísur tað seg, at fólk, ið bera brek, og við varandi sjúkum, til

tíðir ikki hava javnbjóðis møguleika at luttaka í ella fylgja við í ítrótti í Føroyum. Hetta krevur eina betring í hugburði, og ítøkiligar handlingar, bæði frá luttakarum, feløgum og kommunum.

Ítróttasamband Føroya (ÍSF), Fótbóltssamband Føroya (FSF), Parasport Føroyar og MEGD ynskja í felag at virka fyri loysnum, og vil eg í hesum høpi heita á tykkum um at hjálpa við at lýsa, hvat krevst fyri at ymisku ítróttargreinarnar við vissu geva fólki við breki ella varandi sjúku møguleika at luttaka og verða áskoðarar á sama støði sum onnur. MEGD skipaði tí fyri netkanningin í november mánað, ið skal eftir ætlan brúkast sum grundarlag til at gera eina vegleiðing, ið feløg, kommunur og onnur, kunnu fáa íblastur úr til at tillaga virksemi ella karmar. Eftir ætlan fer MEGD at geva herðaklapp til eitt nú feløg, kommunur og onnur, sum í verki megna at tryggja javnbjóðis luttøku og atkomu til áskoðarapláss innan ítrótt í Føroyum.

6 Ymiskt

Altjóða samstarv

Handikapporganisasjonenes Nordiske Råd (HNR)

Noregi hevur formansskapin í HNR (Handikaporganisationernes Nordiske Råd) 2021-2023. Tey, ið sita sum umboð fyri tey Norðurlendsku meginfeløgini eru formenn/kvinnur og aðalskrivarar í meginfeløgunum. Orsakað koronu hava hálvárligu fundirnir verið yvir netið, men um mánaðarskiftið oktober-november 2021 var fundur hildin í Keypmannahavn, har forkvinna og aðalskrivari hjá MEGD kundu luttaka. Í samband við fundin var áhugavert at hoyra umboð fyri Dansk Menneskerettighedsinstitut greiða frá teirra arbeiði.

Rådet för Nordiskt samarbejde hevur verið virkið síðan 2013. Tóra við Keldu, forkvinna, umboðar MEGD í ráðnum, og Bárður Atlason Ísheim, aðalskrivari, er tiltakslimur.

European Disability Forum (EDF)

European Disability Forum er evropeiska meginfelagið fyri fólk, ið brek, og virkar til dagligt fyri at verja áhugamálini hjá yvir 100 milliónum fólkum, ið bera brek. Eins og MEGD, er European Disability Forum óheft átrúnaðarliga og politiskt, og arbeiðir á tí grundarlagi við at byggja brýr millum feløg innan brekøkið í Evropa.

European Disability Forum hevur eisini tætt samstarv við Sameindu Tjóðir (ST) innan mál og viðurskifti, ið hava týdning fyri fólk, ið bera brek.

MEGD fegnast nú um at hava fingið atlimaskap í European Disability Forum. Í næstum fer MEGD undir at fyrireika luttøku og samstarv við onnur meginfeløg í Evropa um at betra um viðurskiftini hjá fólki, ið bera brek og við varandi sjúkum, bæði í Føroyum og úti í heimi.

Umboðan í Ráðum og nevndum í Føroyum

Dugni

Tóra við Keldu umboðar MEGD í ráðnum fyri Dugna.

Ráðið fyri ferðslutrygd

Tóra við Keldu umboðar MEGD í Ráðnum fyri ferðslutrygd.

Javnstøðunevndin

Í samband við kærur um mismun á arbeiðsmarknaðinum skal MEGD hava umboð í arbeiðinum at viðgera kærur sambært lóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum. Bárður Atlason Ísheim, aðalskrivari, umboðar MEGD í nevndini og Tóra við Keldu er varaumboð.

Psykiatriska sjúklingakærunevndin

Nýggir limir vóru valdir í nevndina í 2021, og fyri MEGD var Oda Jóhansdóttir skotin upp sum limur og Vivian Sjóðklett sum varalimur at taka sæti í nevndini.

Sjúklingaráðið

Bygnaðurin í Sjúklingaráðnum varð broyttur í 2022, og limatalið varð harvið minkað frá nýggju til fimm limir, og ásett meira greitt, hvørjar uppgávur og skyldur Sjúklingaráðið hevur. MEGD sendi hoyringarskriv 14. januar 2022. Í juli mánað skipaði MEGD fyri atkvøðugreiðslu á netinum ímillum umboð hjá limafeløgunum í sambandi við valið til Sjúklingaráðið. Vegna limafelgini sendi MEGD 6 ymisk uppskot, og 4 av teimum vórðu vald. Heili 4 út av 5 limum í nýggja Sjúklingaráðnum eru sostatt umboð úr limafeløgunum hjá MEGD. Hesi eru:

- Poula Reinert Olsen (CP Føroyar), Nes, næstforkvinna.
- Hilmar Augustinussen (Alzheimerfelagið), Tórshavn, skrivari.
- Emil Michelsen (Heilafelagið), Øravík.
- Hergerð Joensen (Giktafelagið), Miðvágur

13/03/2022/Bárður Atlason Ísheim, aðalskrivari